Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Ingilín D. Strøm, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

Evni: Javnrættindi til samkynd og børn teirra

Spurningar:

1. Hvussu og nær ætlar løgmaður at tryggja børnum at samkyndum javnrætt?
2. Hevur løgmaður framvegis somu meining sum í februar, at allir borgarar og børn skulu hava javnrætt?

Viðmerkingar:
Í februar í ár varð uppskot um broyting í barsilsskipanini felt. Uppskotið snúði seg um at javnseta samkynd við hinskynd foreldur. Tá var samrøða við Bárð á Steig Nielsen í Degi og Viku[1], har hann vísti á, at øll ynskja javnrætt til allar borgarar og børn í Føroyum, men at tað átti at gerast í lógini um foreldramyndugleika.

Nýggj lóg um foreldramyndugleika er nú send til hoyringar, og tað er greitt, at hon loysir ikki trupulleikan við manglandi rættindum hjá samkyndum og børnum teirra. Bárður á Steig Nielsen vísti somuleiðis á í september í fjør, at børn skulu ikki revsast fyri, hvussu foreldur teirra ynskja at skipa síni viðurskifti[2].

Enn síggja vit ikki nakrar lógarbroytingar, ið loysa teir trupulleikar, sum samkynd hava á familjurættarliga økinum. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 11. august 2021

Ingilín D. Strøm

[1] https://kvf.fo/dv?sid=120102
[2] https://www.in.fo/news-detail/b-rnini-skulu-ikki-revsast-fyri-at-hava-samkynd-foreldur